# Kirkjukór vitjar í Suðuroy

**Komandi vikuskifti fáa suðuroyingar vitjan av Kirkjukórinum í Fríðrikskirkjuni á Toftum**

KÓRVITJAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


*Í næstum fáa suðuroyingar vitjan av kirkjukórinum úr Fríðrikskirkjuni á Toftum*
*savnsmynd*

Toftafólk hava altíð verið kend fyri at eiga nógvar góðar sangarar, og kórini á Toftum hava altíð verið tiltikin góð. Kirkjukórið í Fríðrikskirkjuni er eitt sera virkið kór, sum hetta seinasta árið hevur gjørt nógv burtur úr, at tónaskaldið Hans Jacob Højgaard hevði fylt 100 ár í fjør.

Tvær konsertir á ferðini
Á ferð síni í Suðuroynni komandi vikuskifti fer kórið av Toftum at hava tvær framførslur. Tann fyrra verður í Vágs kirkju leygardagin klokkan fýra, tá ið kórið hevur konsert. Á konsertini fer kórið at framføra løg eftir føroysku tónaskøldini Hans Jacob Højgaard, Knút Olsen og J. Waagstein. Eisini verður solosangur við klaverfylgispæli á skránni. Eisini verða løg eftir Franz Schubert, Johan Sebastian Bach og John Rutter framførd.

Sunnudagin fer kirkjukórið í Fríðrikskirkjuni eisini at syngja undir gudstænastuni í Tvøroyrar Kirkju.

# Skráin klár í næstum

Nú styttist til føroyingar fáa vitjan av donsku kongafamiljuni. Um ein góðan mánað koma Margretha Drotning, Henrik prinsur, Frederik krúnprinsur og Mary krúnprinsessa á vitjan í Føroyum, og tey fara at vitja nógv støð kring landið.

Enn er skráin fyri kongaligu vitjanina tó ikki almannakunngjørd, men tað verður hon væntandi í dag ella í morgin. Tá fæst endaligt at vita, hvørji støð her á landi fáa vitjan av teimum kongaligu. Tað tykist tó greitt, at vitjað verður á Tvøroyri, í Fuglafirði og í Havn, og harafturat bendir nógv á, at kongaligir gestir verða á staðnum, tá ið seinasta skotið í Norðoyatunnlinum verður latið um sama mundi.

**tn**


*Í næstum fæst at vita, hvørjar bygdir og hvørjir býir fáa vitjan av Mary krúnprinsessu og manni hennara, Fríðriki krúnprinsi*
*savnsmynd*

## 811 bilar um samdøgrið

**Sandoy:** Ein uppgerð frá Landsverki vísir, at í 2003 koyrdu í miðal 811 bilar um dagin á vegastrekkinum millum Sand og Skopun.

Landsverk hevur mátað gongdina í ferðsluni á høvuðsvegunum kring landið, og sambært hesi kanningini er líkt til, at ferðslan á hesum staðnum – ikki óvæntað – er økt tey seinnu árini.

Tølini fyri 2004 eru ikki almannakunngjørd enn, men í 1999 koyrdu einans 674 bilar um samdøgrið framvið Meginskúlanum, meðan talið tey seinnu árini hevur verið í støðugum vøkstri.

Í 2002 koyrdu 744 bilar um samdøgrið, meðan talið árið eftir var komið uppá 811.

Teljistaðið hjá Landsverki liggur við Sandsvatn á einum staði, ið nevnt verður Inni í Vika.

**sb.**

## Stuðul til menning

**Útoyggjar:** Møguleiki er nú at fáa stuðul til tiltøk í útoyggjum, sum kunnu virka mennandi fyri hesar.

Innlendismálaráðið hevur nú lýst eina reglugerð, har til ber at søkja um henda stuðul. Hesin stuðul kann veitast einstaklingum, virkjum, feløgum, stovnum og kommunum, men skal í minst møguligan mun virka kappingaravlagandi.

Við umsóknini skal m.a. fylgja ein lýsing av verkætlanini, eins og upplýsast skal um verkætlanin varir fleiri ár.

Umsóknarfreistin at søkja stuðul er 1. juli í ár.

**sb.**


*Fólk á útoyggj hava nú møguleika at søkja um stuðul til mennandi ætlanir*

## Innandura fótbóltskapping á Eiði

**Eiði:** Leygardagin 28. mai verður aftur høvið at royna seg í eini innandura fótbóltskapping í Ítróttarhøllini á Eiði.

Ein kapping av líknandi slap herfyri eydnaðist so mikið væl, og var so skjótt fullteknað, at avgerð er tikin um at endurtaka kappingina eftir sama leisti og á sama staði.

Tað vera bæði dreingja- og gentulið í kappingini, har fimm spælarar kunnu vera inni samstundis. Til tess at gera kappingini rættvísa, verður m.a. bert loyvt einum 1. deildarspælara ella tveimum 2. deildarspælarum at verða við á hvørjum liðnum.

Umframt fóltbólt, verður eisini andakt og onkur spøl á skránni, eins og møguleiki at keypa sær okkurt at eta.

Tað er eitt team, ið fer til Ísraels á evangeliseringsferð í summar, sum skipar fyri kappingini.

**sb.**

# Ferðsluátak í næstum

**Løgreglan fer í næstum at gera eitt ferðsluátak kring landið, har serligur dentur verður lagdur á dekkini á bilunum**

FERÐSLUÁTAK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Farna mánaðarskifti var freistin fyri at fáa píkadekkini undan bilunum úti. Tó gongur tað mangan striltið hjá mongum at fáa skift dekkini, men nú fer løgreglan at kanna eftir, um hetta er gjørt.

**Kuldin hóttir framvegis**
Á politistøðini í Havn verður sagt, at løgreglan í næstum fer at gera eitt ferðsluátak, har teir fara at gera tær sonevndu paragraf 13 kanningarnar. Í sambandi við hesar kanningar verður serligur dentur lagdur á, at píkarnir eru komnir undan bilinum.

Tað kann kanska tykjast eitt sindur løgið, at píkarnir skulu undan bilunum, hóast kuldin framvegis hóttir, og kavin framvegis sæst í fjøllunum. Men vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at hóast tað framvegis kann verða hálka í mai mánað, so er einki hol í løggávuni, sum ger tað møguligt at geva undantaksloyvi í sambandi við hálku í mai.

So tað ræður um hjá øllum, ið enn ikki hava fingið píkarnar undan, at fáa hetta gjørt sum skjótast.